# Kjak



Hans Andrias Sølvará

# Johan Petersen, sambandsfólk og søgubøkur

Hóast Johan Petersen seinastu tíðina í greinum í bløðunum um fólkaatkvøðuna í 1946 hevur gagnnýtt eina bók hjá mær til nakað, sum hon ikki kann bera, so ætlaði eg ikki at leggja meg út í kjak við ein mann, sum í ramasta álvara heldur uppá, at ógildugar atkvøður eru gildugar. Tí tað er sum at kjakast við ein persón, ið heldur seg hava funnið nakrar gamlar dreingir, sum eru giftir. Neyvan kann nakað gott spyrjast burtur úr tí.

Men nú er Johan Petersen við beinleiðis spurningum/skuldsetingum til mín persónliga farin at sáa iva um ta somu bókina, - jú tit lósu rætt - sum hann hevur nýtt sum høvuðsgrundgeving fyri, at føroyingar ikki valdu loysing frá Danmark í 1946. Her er torført at síggja, hvat vendur niður og hvat vendir upp. So er bara at bíða eftir, at Johan Petersen fer at koma við eini nýggjari og endurskoðaðari tulking av fólkaatkvøðuni í 1946.

### Jóannes Patursson og Andras Samuelsen

Johan Petersen heldur tað vera propaganda, at Jóannes Patursson er nógv oftari nevndur í løgtingssøguni enn Andras Soamuelsen – sum um tað er sjálvfylgja, at allir tingmenn skulu nevnast líka ofta í bók um løgtingið. Hevði Johan Petersen gjørt sær tann ómak at hugt í leitiorðini eftir øðrum kendum føroyskum politikarum ella løgmonnum, t.d. Oliveri Effersøe, Peturi Mohr Dam, Atla Dam, Hákuni Djurhuus, Erlendi Paturssyni, Finnboga Ísakssyni o.s.fr, so hevði hann lagt merki til, at teir flestu vera eins nógv ella – alt eftir sjónarhorninum - lítið nevndir sum Andras Samuelsen. Er nøkur saklig grund hjá Johan Petersen til bara at samanbera Andras Samuelsen við Jóannes Patursson. Ella eru saksligar grundir til, at Jóannes Patursson kemur oftari fyri enn flest allir aðrir politikarar? Ella er tað bara tí, at sjálvstýris- og loysingarfólk hava skrivað politisku søgu Føroya? Ella eru tað kanska mest sjálvstýrisfólk, ið hava skapt politisku søgu Føroya?

Kundi svarið verið, at ávísir persónar - uppá gott og ringt – úr ávísum sjónarhornum hava størri týdning enn aðrir? Kann tað t.d. vera, at tá Jóannes Patursson fyllir so nógv í føroyskari politiskari søguskriving, positivt sum negativt, so er grundin, at hann er tann politikarin í 20. øld, sum hevur havt mest ávirkan á politisku søgu Føroya? Tað er í øllum førum greitt, at søgufrøðingar noyðast at seta tílíkar spurningar, heldur enn bara at deila vind og regn líka millum allar politikarar. Søgufrøðingar noyðast, t.e. teir sleppa ikki undan, at velja, hvat teir taka við í eina bók, men valið skal sjálvandi ikki vera tilvildarligt. Tað er tað heldur ikki í løgtingssøguni, har summir politikarar, m.a. Niels Winther og Jóannes Patursson, fylla nógv meir enn aðrir.

Tað eru góðar grundir til, at Jóannes Patursson fyllir nógv í løgtingssøguni. Jóannes Patursson skrivaði í 1903 eina bók, *Færøsk Politik*, har hann søguliga grundgav fyri serstøðu Føroya í Danmark og legði upp til eitt slag av heimastýrisskipan fyri Føroyar. Heimastýrislógin stendur í veruleikanum á prenti í Tingakrossi 11. apríl 1906. Bókin fekk sostatt nærum paradigmatiskan týdning fyri føroyskan politikk í 20. øld. Føroyska sendinevndin, sum fór til Danmarkar í 1946, eftir at føroyingar á fólkaatkvøðu høvdu valt loysing, - eg endurtaki høvdu valt loysing - hevði t.d. hesi sjónarmið Jóannesar Paturssonar við niður í skjáttuni. Sambandsmenn, t.d. Oliver Effersøe, stríddust av øllum alvi móti heimastýrishugsjónunum hjá Jóannesi Paturssyni í *Færøsk Politik* – líka til tær í 1948 eisini sigraðu á sambandsmonnum. Tá vóru nógv føroysk sjálvstýrisfólk farin longri út á sjálvstýrisvongin enn so, meðan Sambandsflokkurin av neyð góðtók tey gomlu sjónarmiðini hjá Jóannesi Paturssyni. Andras Samuelsen, fyrsti føroyski løgmaðurin síðan 1816, virkaði ironiskt nokk undir eini skipan, sum í veruleikanum hevði sín hugsjónarliga uppruna í *Færøsk Politik* frá 1903, sum eisini varð ávirkað av gongdini í Íslandi aftaná 1851. Hvør av teimum, Jóannes Patursson ella Andras Samuelsen, hevur havt størri politiskan týdning fyri Føroyar í søgunnar ljósi? Svarið gevur seg sjálvt.

Danin Johan Christian Helms, sum var sorinskrivari í Føroyum í 1903-1911, segði í 1919 so greitt frá hesum muninum á sjálvstýris- og sambandsmonnum:

*Selvstyrepartiet er efter sin Natur det aktive Parti deroppe, det, som har nye Planer, nye Ting at gennemføre, medens Sambandspartiet efter mit Skøn for meget holder sig til Forsvaret. Der kommer først rigtig Fart og Liv i Sambandspartiets Kamp, naar det angriber det yderliggaaende Selvstyrepartis Personer eller dets Presse. ... Sambandspartiets ... Politik er for lidt positiv, for meget negativ. Det drejer sig alt for meget om at styre Modpartiets Førere, angribe dets Presse, og Partiet gør for lidt for at fremme Sambandet, det vil sige Forbindelsen, Samkvemmet mellem Danmark og Færøerne, det gør for lidt ad praktisk Vej.*

Helms saknaði týðiliga nakrar sambandsmenn, sum vildu nakað annað enn bara vera ímóti teimum broytingum, sum Sjálvstýrisflokkurin ynskti at fremja og ofta fekk framt.

Tað kann vera, at m.a. Andras Samuelsen átti at fingið størri rúmd í bókini um løgtingið, men tað er ein sannroynd, at Jóannes Patursson hevur havt nógv størri ávirkan á politisku søgu Føroya enn Andras Samuelsen. Tað hevur Jóannes Patursson uttan mun til, hvat man annars heldur um hann. Tað hevur hann uttan mun til, um man er sambands- ella sjálvstýrisfólk. Tað er ikki eitt val, sum eg havi gjørt; tað er eitt søguligt faktum, at Jóannes Patursson hevur havt størri ávirkan á føroyskan politikk enn Andras Samuelsen.

Tað tykist eisini týðiligt, at tá Johan Petersen heldur, at bumbuatsóknin móti løgtinginum í 1945 átti at staðið í tingsøguni, so er tað tí, at hann er úti eftir loysingarfólki. Tað eru ikki avrik Sambandsfloksins, sum hann vil hava í søguna, men misgerðir hjá loysingarfólki – men um hann veit hvør legði bumbuna, so veit hann meira enn eg. Tað er møguligt, at hendan søgan átti at staðið í løgtingssøguni, men tað hevði verið propaganda, um eg hevði lagt nakran politiskan flokk undir at standa aftanfyri. Eg valdi heldur at leggja dent á politikkin, serliga á politiska stríðið fyri at vinna løgtinginum størri heimildir – tað er jú høvuðssøgan hjá løgtinginum síðan 1852. Tað er møguligt, at politiska stríð Sambandsfloksins dettur eitt sindur niður ímillum úr hesum sjónarhorni, sum er avgerandi fyri søgu løgtingsins, men eg havi roynt at lýst bæði sjónarhornini.

Tað verður ofta sagt, at tað eru vinnarar, sum skriva søguna, men orsøkin er ofta tann, at tað eru vinnarar, sum skapa søguna. Hevði Sambandsflokkurin framvegis havt tað vald, sum hann hevði í tíðini fyri seinna kríggj, so hevði danskt helst framvegis verið frálærumál í føroysku skúlunum, Dannebrog einasta flaggið og løgtingið hevði helst framvegis verið eitt amtsráð, sum danskir myndugleikar kundu taka við upp á ráð – tá ella um teir ynsktu tað. Men sjálvstýrissjónarmiðini hjá Jóannesi Paturssyni í *Færøsk Politikk* hava sigrað so fullkomiliga, at summi sambandsfólk heilt tykjast hava gloymt, at tey í veruleikanum virka innan fyri eitt paturssonskt paradigmi, sum sambandsmaðurin Oliver Effersøe í 1906 legði undir at vera rein seperatisma.

Er tað yvirhøvur neyðugt at spyrja, hví Jóannes Patursson fyllir nógv meira í politisku søgu Føroya enn Oliver Effersøe, Andras Samuelsen og fleiri aðrir politikarar, sum als ikki eru nevndir í løgtingssøguni? Eg haldi ikki.

### Fólkaatkvøðan í 1946

Johan Petersen velur so sanniliga eisini út, tá hann nýtir mína bók sum grundgeving fyri, at føroyingar ikki valdu loysing í 1946, men hann velur ikki serliga heppið. Hann velur enntá soleiðis, at hann bara endurgevur kjakið og gloymir grundstøðið, sum kjakið er grundað á. Grundstøðið stendur á síðu 274: » *... av teimum 63,7% av veljarafjøldini, sum gildugt nýttu sín rætt til at atkvøða í 1946, atkvøddi ein meiriluti uppá 50,7% fyri loysing, meðan 49,3% atkvøddu fyri stjórnaruppskotinum. Formliga høvdu føroyingar valt loysing, spurningurin varð, hvat nú skuldi henda*«. Síðan kemur viðgerðin av politiska kjakinum í Føroyum um úrslitið av fólkaatkvøðuni, har summir føroyskir politikarar mæla til kvalifiseraðan meiriluta, meðan aðrir mæla til, at ógildugar atkvøður skulu telja við – alt eftir, hvørji áhugamálini eru. Staðfest verður á síðu 279, at: »*Trupulleikin við hesum sjónarmiðinum er tann, at einki stóð um, at kvalifiseraður meiriluti var neyðugur í sjálvari løgtingssamtyktini um fólkaatkvøðu, sum Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin sjálvir høvdu samtykt ... Hóast lítið var at ivast í, at* ***formliga*** *vóru »Nei« atkvøðurnar ógildugar, sjálvt um Thorstein Petersen undan fólkaatkvøðuni hevði sagt nakað annað, og* ***formliga*** *var vanligur meiriluti galdandi til fólkaatkvøðuna, tá einki annað var viðmerkt, so var støðan ógreið, tí í politiska virki sínum høvdu føroysku politikararnir við Thorsteini Petersen á odda skapt so nógva óvissu um fólkaatkvøðuna ...*«. Politiski veruleikin var tí soleiðis, at: »*Hóast tey reint løgfrøðiligu viðurskiftini søgdu, at loysingin varð samtykt, so vóru politisku realitetirnir so ógreiðir, at fólkaatkvøðan í veruleikanum kundi útleggjast uppá fleiri ymiskar mátar*«. Formliga – t. e. løgfrøðiliga/rættarliga – er tað sjálvandi óviðkomandi, hvat Thorstein Petersen o.a. politikarar høvdu lovað sínum veljarum fyri ella eftir fólkaatkvøðuna. Eftir umrøðu av stórpolitisku viðurskiftunum verður endaliga niðurstøðan í bókini »*at uttan breiða semju í Føroyum vóru tað stórpolitiskir veruleikar uttan fyri foroysku landoddarnar, sum komu at verða avgerandi fyri politisku viðurskiftini í oyggjunum og ikki formligu úrslitini av atkvøðugreiðslum í Føroyum ella í Løgtinginum*« (síðu 289). Einki av tí »sitatmosaikkinum«, sum Johan Petersen hevur borðreitt við, broytir nakað petti upp á hesa niðurstøðuna.

### Niðurstøða

Einki mannaverk er fullfíggjað og løgtingssøgan er sjálvandi ikki nakað undantak. Tá man verður biðin um at skriva saman eitt 400 síður stórt yvirlitsverk yvir 1000 ára tingsøgu – uttan at fáa stundir og høvi til at kanna upprunaheimildir – koma onkur viðurskifti skeivt fyri, lítið pláss verður sjálvandi til tey einstøku tingfólkini, teir flestu politikarar verða als ikki nevndir, men tað broytir einki upp á ta sannroynd, at summi sjónarmið hava størri politiskan týdning enn onnur, og at ógildugar atkvøður eru ógildugar. Í løgtingssøguni royndi eg at lýsa fólkaatkvøðuna í 1946 úr fleiri sjónarhornum, men persónliga haldi eg ikki, at tað hevði verið av nógv at kravt av m.a. sambandstingmonnunum, at teir hildu seg til tað fólkaatkvøðuorðing, sum teir sjálvir samtyktu á løgtingið 9. mai 1946. Men nei, enntá ikki í dag vilja sambandsfólk sum Johan Petersen halda seg til egnu løgtingssamtyktir Sambandsfloksins frá 1946, men verja seg við høpisleysum sjónarmiðum hjá fullveldismonnum, m. a. Thorsteini Petersen, og geva søgufrøðingum skyldina fyri, at Sambandsflokkurin ikki eigur nakran politikara, sum hevur havt líka stóra ávirkan á politisku søgu Føroya sum Jóannes Patursson. Ongantíð havi eg hoyrt tjóðveldisfólk kæra sína neyð um, at Erlendur Patursson bara er nevndur 3 ferðir. Orðini hjá Helms um sambandsfólk - í øllum førum um summi - tykjast líka sonn í dag, sum tey vóru í 1919. Sjálvt tá Johan Petersen roynir at verja sítt nei til loysing, leitar hann sær hjálp hjá einum fullveldismanni.

Tað verður neyvan soleiðis, at sambandsfólk tryggja sær størri pláss í teimum føroysku søgubókunum.